Politikararnir mugu hugsa langsiktað

Vit mangla ein greiðan vinnupolitikk, men føroyingar hava stutt og greitt brúk fyri útlendskum pengum í vinnulívinum, sigur Jóhan Páll Joensen, stjóri á flakavirkinum Norðís á Eiði

VINNUÚTLIT
Edvard Joensen

– Vit mugu sleppa undan at slíkar støður sum tann við Havsbrún stinga seg upp. Tað ber ikki til, at vit skulu gera politiskar loysnir til hvørt einstakt mál, tí vit ikki eru fyrireikað, sigur Jóhan Páll Joensen

Mynd: Edvard Joensen

Høvdu vit ein greiðan politikk fyri, hvørjum treytum útlendingar skuldu virka undir í føroyskum vinnulívi, sluppu vit undan aktuellu støðuni, sum nú er íkomin, tí fremmandur kapitalur vil keypa Havsbrún, sigur Jóhan Páll Joensen stjóri á Norðís.

Hann heldur, at vit hava brúk fyri útlendingum í vinnulívinum. Teir kunnu geva okkum pengar, vitan og atgongd til heimsmarknaðin. Og teir seta okkum krøv, so vit ikki sovna, men gera okkum før fyri at hugsa. í altjóða høpi. Men teir eiga at fáa at vita frá fyrsta degi, at teir arbeiða undir føroyskum treytum.

Eitt er, at útlendingar koma inn í føroyska vinnulívið við pengum og vitan. Eitt annað er, um føroyingar yvirhøvur eru klárir at taka í móti teimum, tá teir koma.

Jóhan Páll Joensen heldur ikki, at vit eru tað. Vit síggja tað ferð eftir ferð, tá okkurt hendir sum nú hatta við Havsbrún. So fer alt upp at renna og gera loysnir, sum nú passa til júst tað aktuella málið.

Her eru poltikararnir ov seinir á sjóvarfallinum. Vit áttu langt síðan at havt fingið ein greiðan politikk um útlendskan kapital í føroyskum vinnulívið yvirhøvur, sigur Jóhan Páll. Tað eigur at leggjast ein langtíðarætlan, soleiðis at vit sleppa undan panikkloysnum, sum kunnu væntast fyrr ella seinni.

Hava vit hinvegin ein greiðan langtíðarpolitikk, sum sigur hvørjar treytirnar eru, sum útlendingar seta pengar í føroyskt vinnulív eftir, var einki at vera bangin fyri.

Jóhan Páll Joensen vísir á, at felagið, hann er partaeigari í, og sum so aftur eigur í Norðís, hevur útlendskar partaeigarar.

Tað skilst á honum, at hetta eru bretar. Við teimum hevur felagið fingið partapening og vitan. Men ikki minst hevur felagið fingið handilssambond og atgongd til bretska marknaðin fyri hýsuna, sum arbeidd verður á Norðís.

Hetta er tó ikki so, at Norðís til einahvørja tíð er bundið at útlendsku partaeigarunum. Teir eru við upp á handilsligar treytir. Soleiðis, at tá tað ikki loysir seg at handla við teir, verður farið aðrastaðni.

Soleiðis heldur hann eisini, at allir útlendskir íleggjarar í føroyskum vinnulívið skuldu verið stillaðir. Sloppið við undir handilsligum fyritreytum.

Jóan Páll er einki fyri, at vit avmarka alt ov nógv kortini. Gera vit tað so tvørligt, at eingin tímir at koma til Føroya við pengum, byrgja vit okkum inni, og so er galið.

Tað er ikki alt, sum hongur nóg væl saman, heldur Jóhan Páll Joensen. Vit tosa um at seta avmarkingar í vinnuna, samstundis sum vit tosa um partabrævamarknað.

Fara vit á børsin, er ikki vist, at vit sjálvir sleppa at avgera, hvussu nógv hvør partaeigari skal eiga. Tí skuldu vit helst, áðrenn nakað slíkt verður gjørt, gjørt av, hvar tær ymsu fyritøkurnar verða flokkaðar. Í fyritøkur, sum kunnu umsetast púra frítt, ella í fyritøkur, sum eitt nú útlendingar bara kunnu eiga partvís.

Eitt er, sigur Jóhan Páll Joensen, at vit tosa um pengar í sjálvum feløgunum. Men eitt annað, sum handlað eisini verður við, er tilfeingið hjá okkum.

Jóhan Páll Joensen sigur, at hann heldur, at myndugleikarnir eiga at seta útlendingum avmarkingar í brúksrættinum til okkara tilfeingi.

Har hongur heldur ikki saman. Tað stendur í lógini um vinnuliga fiskiskap, at tilfeingið er ogn Føroys Fólks. Og tað samsvara ikki við tað, sum veruliga hendir.

Um so er, at tilfeingið er fólksins ogn, átti tað als ikki at kunnað verið selt ella handlað við, sum støðan er í løtuni. Men vit síggja regluliga, at fiskiloyvi verða seld fyri nógvar pengar.

Nú verður so eisini tosað um at hava ein fiskidagamarknað, har dagar kunnu keypast fyri dagsprís.

Hesum gongur stjórin á Norðís ikki inn fyri. Hann heldur ikki, at rætturin til tilfeingið skal vera nakar ognarrættur, men ein brúksrættur. Tað vil siga, at tann, sum fær rætt at fiska, skal fáa hann fyri einki. Men so skal hann eisini lata rættin aftur til fiskivinnumyndugleikan beinanveg, hann gevst at nýta rættin.

Fiskiloyvið - og fyri tann skuld eisini aliloyvið - skal um myndugleikan, áðrenn tað skiftir brúkara, sigur Jóhan Páll Joensen.

Tá tosað verður um fría umsetiligheit, heldur Jóhan Páll Joensen, at tað má so bara vera í Føroyum, at vit kunnu hava slíka. Tí hann ásannar, at hóast tað er í lagi, at útlendingar seta pengar í vinnuna, kunnu vit rættiliga skjótt hvørva, um tað verður óavmarkað.

Tí er tað, at stjórin á Norðís, Jóhan Páll Joensen, eftirlýsir einum greiðum, langtíðar vinnupolitikki í Føroyum.

– Okkum tørvar ein langsiktaðan vinnupolitikk, sigur Jóhan Páll Joensen, stjóri á flakavirkinum Norðís

Mynd: Edvard Joensen

Bøndurnir vóru ikki blíðir

Kunnandi fundurin um avleiðingarnar av heilsufrøðiligu avtaluni við ES, sum Bóndafelagið helt fríggjadagin, var væl vitjaður. Og uppmøttu limirnir vóru ikki smædnir at vísa sína ónøgd, men tá politiski myndugleikin ikki var til staðar, máttu embætismenninir taka sløgini.

ES-AVTALA
Rúnar Reistrup

Ørkymlaðir, onkur eitt sindur óður, men kortini hóvligir vóru teir, limirnir í Bóndafelagnum, sum møttu mannsterkir á fundi

Mynd: Jens K. Vang

»Vit mótmæla at: Latið er upp fyri fríum einvegis innflutningi av djórum til Føroya, men ikki fyri útflutningi eftir somu treytum. At landbúnaðurin ikki bleiv spurdur eftir, tá avtalan varð gjørd. Og vit mótmæla, at landbúnaðurin er blivin offraður fyri fisk«.

Orðini hjá Bjørn Patursson, formanni Bóndafelagsins, sum setti kunnandi fundin um heilsufrøðiligu avtaluna við ES, lótu ongan iva vera um, at bøndurnir kenna seg illa viðfarnar.

Bjørn Harlou, landsdjóralækni og Ásmundur Guðjónsson frá Heilsufrøðisligu Starvsstovuni vóru gestir á fundinum, og teirra uppgáva var at greiða limunum í Bóndafelagnum frá, hvat avtalan við ES merkir fyri føroyskan landbúnað.

Hvørgin teirra helt, at landbúnaðinum nýttist at óttast avleiðingarnar av, at innflutningseftirlitið av djórum og djóraúrdráttum, sum koma úr ES londum til Føroya nú fellir burtur. Hesum var at kalla hvørt menniskja í salinum ósamd við teimum í.

Landsdjóralæknin illoyalur

Men tað, sum hevur vakt størstu ørkymlanirnar hjá bøndunum er tann samráðingarhátturin, sum varð brúktur, tá avtalan fekst í lag.

Bøndurnir vístu á hvussu Ísland, Noreg og onnur triðjalond hava sett ávísar avmarkingar í avtaluna við ES til tess at verja landið fyri dýrasjúkum. Hetta samanbóru teir so við føroyska samráðingarúrslitið, har als ongar avmarkingar eru á dýrainnflutninginum úr ES.

Fundarluttakararnir fingu at vita, at landsdjóralæknin bleiv spurdur undir samráðingunum, um hesin hevði nakra viðmerking til, at markið millum ES og Føroyar varð latið upp fyri fríum innflutningi av livandi djórum, og at hesin hevði svarað noktandi.

Hetta hildu bøndurnir sera lítið um og landsdjóralæknin varð lagdur undir at vera illoyalur mótvegis bøndunum. Til hetta svaraði Bjørn Harlou, at tað ikki var hansara uppgáva at vera loyalur mótvegis bøndunum, men at ráðgeva landsstýrinum eftir besta førimuni.

Politikararnir vantaðu

Og tað var júst her, at fundurin haltaði. Kunnandi fundurin gjørdist í stóran mun til ein kjakfund millum bøndurnar og tveir embætismenn um eina politiska prioritering av fiskivinnuni fram um landbúnaðin.

Men sum annar av gestunum vísti á, so vóru tað ikki embætisfólkini, ið høvdu lagt avtaluna fyri tingið og samtykt hana.

Tann politiski myndugleikin, sum ber ábyrgdina av at hava sett tey tiltøk í verk, sum bøndurnir ørkymlast um og óttast fyri, var ikki til staðar, og tí hendi ikki nógv annað á fundinum enn at bøndurnir fingu upplýsing um avtaluna og at nakrir teirra sluppu av við eitt sindur av vreiði.

Tutl pakkar saman í Fútastovu

Fløguhandilin í Fútastovu í Havn, sum Plátufelagið Tutl rekur, syngur nú sítt seinasta vers á hesum sinni. Fútastova skal umvælast, og Tutl nýtir høvið at taka seg úr handilsvinnuni og ístaðin savna alla orkuna um fløguútgávur og innflutning av fløgum.

TÓNLEIKUR
Rúnar Reistrup

Fløguhandilin við óiva størsta fløguúrvalinum í Føroyum, letur aftur um fjúrtan dagar. Talan er um fløguhandilin hjá Tutl, sum undir øllum umstøðum mátti út úr Fútastovu nú og sum í sama viðfeingi hevur valt at sløkkja ljósið fyri seinastu ferð.

– Vit hava leingið verið av teirri áskoðan, at tað er nóg mikið við einum góðum fløguhandli í miðbýnum í Havn, og harafturat hava vit havt eitt ynski um at brúka ein størri part av orku okkara til at marknaðarføra nógvu nýggju fløguútgávurnar hjá plátufelagnum, sigur Kristian Blak, sum er høvuðsmaður aftan fyri Tutl.

Fløguhandilin hjá Tutl byrjaði sítt virksemi miðskeiðis í hálvfemsunum í einum leigaðum hølum í SMS. Men eftir at handilin hevði verið har eitt ár og fyrsta skeiðið í leigusáttmálanum var av, var SMS ikki sinnað at leingja sáttmálan, og fløguhandilin gjørdist sostatt húsvillur.

– Tað gekk sera væl hjá okkum tað fyrsta árið, tá vit vóru í SMS. So vit høvdu ongan hug at gevast, hóast SMS eftir øllum at døma ikki dámdi tann leistin, sum vit róku handilin eftir, sigur Kristian Blak.

Ein fyribils loysn

Endin varð, at Tutl flutti oman í Fútastovu, men hetta var ongantíð meira enn ein fyribils loysn.

– Vit hava vitað frá byrjan, at húsini skuldu umvælast, og at vit noyddust úr húsunum tá. Nú er Fútastova eftir hondini so illa farin, at skulu húsini umvælast, so skal tað vera nú, sigur Kristian Blak.

Eigarin av Fútastovu, Óli Samró, hevur boðað Tutl frá, at hann ikki ætlar at leiga húsini út aftur eftir umvælingina.

– Vit høvdu so tað val at finna okkum nýggj hølir ella at gevast við at reka handilin, og eru nú komin fram til, at tað man loysa seg best at gevast, sigur Kristian Blak.

Ikki bara business

Men áðrenn Tutl kundi taka hesa avgerð, máttu avtalur fáast upp pláss við aðrar fløguhandlar, soleiðis at endamálið hjá felagnum framhaldandi verður uppfylt.

Fløguhandilin hjá Tutl hevur nevniliga umframt handilsligt endamál, eisini sum endamál at geva kunnunum eitt breitt úrval av tónleiki og arbeiða fyri at fáa tann "smala" tónleikin fram í ljósið.

Millum annað stendur í endamálsorðingini fyri fløguhandilin, at altjóða popptónleikur ikki má fylla meira enn helvtina av framsýningarplássinum í handilinum, at tónleikaúrvalið skal vera so fjølbroytt sum gjørligt, og at handilin skal inniflyta fløgur eftir ynski frá viðskiftafólki,

– Vit vóru noydd at tryggja okkum, at føroysk viðskiftafólk framhaldandi hava møguleikan at fara inn í ein fløguhandil og biðja handilin um at fáa eina ávísa fløgu til vega. Og tað hevur nú eydnast okkum at gjørt eina avtalu við H.C.W. Tórgarð í Havn og Leikalund í Klaksvík sum tryggjar hetta. Hevði tað ikki borið til at fingið hesa avtaluna, høvdu vit hildið fram við onkrum slag av fløguhandli í framtíðini, sigur Kristian Blak, tí fløguhandilin ogn hjá tónleikarunum og er fyrst og fremst ein liður í at røkka nøkrum settum málum.

Hesir báðir handlarnir fara helst eisini at yvirtaka fløgugoymsluna hjá handlinum í Fútastovu.

Innflyta og marknaðarføra

H.C.W. Tórgarð og Leikalund fara í framtíðini at samstarva við Plátufelagið Tutl um innflutning av fløgum eftir ynski frá viðskiftafólkum. Tutl fer eisini at halda fram at innflyta fløgur frá einum umleið tjúgu útlendsku plátufeløgunum, sum Tutl higartil hevur samstarvað við.

Men har sum Plátufelagið Tutl serliga ætlar at leggja spardu orkuna frá fløguhandlinum er í marknaðarføringina av teimum útgávum, sum felagið stendur fyri.

– Vit hava gjørt ov lítið fyri at fáa okkara útgávur fram. Fløgan er komin til landið og er sett á hillina í handlinum. Bert hendinga ferð verður nakað gjørt burturúr at fáa útgevandi bólkarnar at spæla konsertir og annað tílíkt til frama fyri søluna av fløguni, men hetta fer at broytast nú, vit ikki longur hava fløguhandilin at hugsa um, sigur Kristian Blak.

Fólk skulu neyvan vænta at síggja ein stóran fløguhandil aftur undir navninum hjá Tutl, men Kristian Blak útilokar ikki, at plátufelagið fer at lata onkran minni og meira spesialiseraðan handil upp einaferð í framtíðini. Tað veldst alt um hvørji hølir vera til taks.

Í løtuni leitar Plátufelagið Tutl eftir hølum til virksemi sítt.